## Fróði verður HB'ari

Eftir trý ár í B36 fer Fróði Benjaminsen nú norður um til grannarnar í HB at spæla. Landsliðsspælarin hevur gjørt tvey ára sáttmála við HB vóru boðini, sum leiðslan í HB kundi bera veitslugestunum á ársveitsluni leygarkvøldið. Hartil varð staðfest, at Andrew av Fløtum hevur skrivað fýra ára sáttmála við felagið, eins og Mortan úr Hørg og Ólavur S. í Ólavsstovu hava longt sínar sáttmálar.



## Stórt undirskot í Brøndby

Nevndin í danska fótbóltsfelagnum, Brøndby IF, hevur viðgjørt roknskaparúrslitið hjá felagnum 3. ársjórðing í ár, og fyri framman liggur eitt undirskot áljóðandi heilar 21-24 mió. kr. Felagið skrivar á heimasíðu sínari, at atvoldin til stóra undirskotið er, at felagið hevur havt eitt so vánaligt kappingarár í donsku Superliguni. Brøndby liggur í løtuni nummar níggju við 14 stigum fyri 14 dystir, og hetta hevur millum annað ført til minkandi áhuga millum sjónvarpsstøðir, og sølan av eitt nú leikarabúnum er minkað munandi.

## NSÍ'ari vann DM

**Á U16 liðnum hjá OB, sum í gjár gjørdist danskur meistari, spælir Viljormur í Heiðunum Davidsen, sum áður hevur spælt við NSÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin kom enn eitt gullheiðursmerki í fótbólti til Runavíkar – í hvussu so er næstan. OB í Odensen gjørdist danskur meistari í kappingini millum U-16 dreingir. Á liðnum var Viljolmur í Heiðunum Davidsen, sum er uppvaksin í NSÍ, og sum seinastu mánaðirnar hevur verið á fótbóltsskúla á Fyn.

Viljormur er verjuspælari. Tá ið U-17 landsliðið fyri stuttum luttók í EM undankapping, var hann fastur miðverji.

Leygardagin var OB í Esbjerg. Hetta var í triði síðsta umfari. Longu undan hesum umfarinum var greitt, at OB fór at verða meistari, um teimum eydnaðist at fara aftur um Lítlabelt við einum stigi. Tað megnaði OB so ruddiliga. Teir vunnu 4-0 ímóti Esbjerg, sum er nummar trý í hesi kappingini.

Leygardagin verður møguleiki í næstsíðsta umfari at síggja meistaraliðið í Ådalinum í Odense.

# NSÍ heldur fast um Nenand

**Sterki miðvallarin, sum var týðandi spælari í FM-heitinum hjá NSÍ, hevur skrivað undir nýggjan tveyára sáttmála. Eisini heldur Jónhard Frederiksberg fram hjá meistarunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Nenad, er helst tann besti miðvallaleikarin í Føroyum í løtuni, og hevur hann havt ein sera týðandi leiklut á formulaliðnum hjá NSÍ í ár, og hevur tað sjálvsagt stóran týdning fyri okkum, at vit nú hava kunna gjørt ein nýggjan sáttmála, sum er galdandi fyri tvey ár, sigur Dánial Petur Hansen, formaður í NSÍ, í stuttari viðmerking til heimasíðu felagsins.

Umframt Nenad, hevur felagið eisini gjørt avtalu við bróðurin Predrag Stankovic um at halda fram sum málverji í felagnum.

Eisini er greitt, at Jónhard Frederiksberg heldur fram í felagnum. Eins og Nenad Stankovic, so kom Jónhard til NSÍ saman við Jóhan Nielsen, venjara, og eins og Jóhan hevur Jónhard gjørt av at leingja sín sáttmála. Tað sama hevur Pauli Hansen, hjálparvenjari, gjørt, so illa ber til at siga annað, enn at trolingin, sum NSÍ í fjør gjørdi á Skála, hevur roynst felagnum heilt væl.



*Eingin ivi er um, at NSÍ við undirskriftini hjá Nenad hevur vissað sær ein sera týðandi brikk í royndini at verja nývunna FM-heitið*

# Stórdystur til Eyðun og Andreas

**Tá danska FCK um tvær vikur spælir móti Kópavági í 3. umfari av EHF-kappingini, verður tað við føroyskum dómarum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan er uttan samanbering um størstu avbjóðingina, sum Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen higar til hava fingið sum altjóða dómarar.

Talan er um dystin í 3. umfari av EHF-kappingini, og er lítið at ivast í, at FCK er stórfavorittur at spæla seg víðari. Danska felagið hevur seinnu árini styrkt hópin miðvíst, og í dag telur liðið fleiri altjóða profilar, sum ætlandi skulu lyfta liðið móti europisku hæddunum.

- FCK hevur eitt sera sterkt lið. Teir spældu um vikuskiftið móti meistarunum úr GOG, og vunnu tann dystin við fimm málum, og tað sigur nógv um styrkina hjá teimum. Íslendingar hava eisini stóra fysiska styrki, og tí koma vit at uppliva ein dyst, sum gongur fyri seg í eini nógv hægri leikferð, enn vit eru vanir við. Og tað er helst tað, sum vit eru mest spentir um, sigur Eyðun Samuelsen.

- Og sálarliga krevur tað eisini nógv av okkum, tá vit skulu fyrireika okkum til ein slíkan dyst. Vit skulu í øllum førum vera heilt uppi at koyra frá fyrsta bríksli. Og samstundis ræður um hjá okkum at halda beinini á jørðini. Vit skulu alla tíðina fyrireika okkum, sum um var hetta ein »vanligur« dystur. Men sjálvandi fyrireika vit okkum meira, tá vit eru saman í døgunum upp til ein dyst. Í Føroyum hevur tú jú eisini vanliga gerandisdagin at taka atlit til, og tí fært tú betri savna tankarnar til eina slíka uppgávu, Eyðun.

Hann og Andreas F. Hansen fara til Íslands fríggjadagin 16. november. Dysturin millum Kópavág og FCK verður spældur sunnudagin 18. november.